LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fylgiskjal 3

Ummælisskjal

Ummæli er komið frá Føroya Rætti, Føroya Politi, Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Fróðskaparsetrinum, SSP-Ráðgevingini, Etiska Ráðnum, Amnesty Føroyar, Brotsfrøðifelag Føroya og Kvinnuhúsinum.

Heilsumálaráðið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

Føroya Rættur hevur yvirskipa ongar viðmerkingar til uppskotið, men mælir til, at tað í viðmerkingunum greitt verður víst á donska broytingarlógina, sum uppskotið byggir á.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingin er tikin til eftirtektar og at tað nú greitt framgongur hvørja danska broytingarlóg uppskotið byggir á.

Føroya Politi fegnast um uppskotið, og hevur yvirskipa ongar viðmerkingar. Mælt verður tó til, at fyrningarfreistin í § 94, stk. 4 verður broytt, soleiðis at ásetingin eisini fevnir um lokking sambært § 229.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingin er tikin til eftirtektar og at lógaruppskotið er tillagað samsvarandi hesum.

Sig Frá!/Almanna- og mentamálaráðið varðar av heildarverkætlanini um harðskap í parlagi og nærsambondum. Partur av hesum arbeiði er at kunna um harðskap. Sig Frá! fegnast um ætlaðu broytingarnar í revsilógini, ið eru í samsvari við tað arbeiðið, ið Sig Frá! saman við øðrum hevur staðið fyri hesi seinastu árini.

Sig Frá! metir, at tað eigur at upplýsast og kunnast alment um tær broytingar, sum uppskotið leggur upp til. Sig Frá! skipar fyri upplýsandi tiltøkum og fær til vega undirvísingartilfar fyri yrkisbólkar, felagsskapir og myndugleikar. Á hesum grundarlagi metir Sig Frá!, at uppskotið kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið við sær.

Løgmálaráðið er samt við Sig Frá!, at tað eigur at kunnast um tær broytingar, sum lógaruppskotið leggur upp til. Løgmálaráðið hevur tí tikið viðmerkingina hjá Sig Frá! til eftirtektar, og tillagað viðmerkingarnar í uppskotinum í samsvari við hetta.

Amnesty Føroyar sigur, at kynsligur harðskapur á netinum er ein vaksandi trupulleiki og at vit revsirættarliga ikki hava megnað at fylgt við teimum møguleikum fyri kynsligum ágangi á netinum, sum talgilda menningin hevur ført við sær. Amnesty Føroyar fegnast tí um uppskotið.

Amnesty Føroyar tekur undir við, at aldursmarkið í samband við lokking verður sett til 18 ár. Samstundis ger Amnesty Føroyar vart við, at atlit eiga at vera tikin til serliga sárbærar bólkar t.d.

fólk, ið bera ávís brek, og at tað tí kann hugsast, at tað í summum førum ikki er hóskandi, at markið er 18 ár.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ásetingin um lokking, er ætla at raka tilburðir, har tað ikki kann førast prógv fyri roynd at gera eitt ítøkiligt kynsligt brotsverk. Tilburðir, sum í dag kunnu revsast sum roynd at bróta § 216, stk. 2, § 222 í revsilógini ella § 216, stk 2 og § 222 samanber § 225, skulu sostatt eisini framyvir revsast eftir somu ásetingum. Tá talan er um misnýtslu av persónum, ið bera ávís brek, kann man í nógvum førum revsa fyri roynd at fremja brot á § 218 (at skaffa sær samlegu við at misnýta annans sálarsjúku ella sálarliga menningartarn).
Annars verður tað upp til dómstólarnar at meta um, hvussu uppskotna ásetingin ítøkiliga skal brúkast framyvir.

Amnesty Føroyar ger vart við, at revsing ikki kann verða einasta amboðið til at koma talgildan harðskap til lívs. Tí vísir Amnesty á, at tað er týdningarmikið, at neyðugur peningur verður settur av til skúling, kunning og fyribyrging. Tað má tryggjast, at øll viðkomandi starvsfólk verða skúlaði í nýggju ásetingunum og í kynsligum harðskapi á netinum sum heild.

Amnesty Føroyar ger eisini vart við, at tað er týdningarmikið, at børn og ung fáa neyðugu vitanina um, hvussu kynsligur harðskapur á netinum kann síggja út, hvaðar tey skulu venda sær og hvussu tey skulu bera seg at, skuldu tey verið fyri hesum. Hetta kundi verið gjørt við at tryggja, at øll børn í føroysku barna- og ungdómsskúlunum fáa góða, nøktandi og aldurshóskandi seksualupplýsing, har mørk, samtykki og kropsligur sjálvsavgerðarrættur er partur av hesi upplýsingini.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er samt við Amnesty Føroyar, at tað eigur at kunnast um tær broytingar, sum lógaruppskotið leggur upp til. Sig Frá! varðar av heildarverkætlanini um harðskap í nærsambondum – herundir kynsligan harðskap og skipar javnan fyri upplýsandi tiltøkum um harðskap, og um at seta egin mørk og at virða mørkini hjá øðrum. Løgmálaráðið metir, at kunning innan hetta økið liggur hjá Sig Frá! og hevur tillagað viðmerkingarnar um fíggjarligar avleiðingar sambært hesum.

Amnesty Føroyar heitir á Løgmálaráðið um at málið í lógartekstinum og í viðmerkingunum er kynsneutralt.

Løgmálaráðið skal viðmerkja at málið í lógartekstum, so vítt møguligt eigur at vera kynsneutralt. Orðingin "gerningsmaður" er tó brúkt gjøgnumgangandi allastaðni í revsilógini, og mett verður ikki, at tað er rætt at broyta hetta nú. Hetta má heldur gerast, tá ið arbeiðið við at gera eina føroyska revsilóg verður sett í gongd, soleiðis at sama orðing verður nýtt allastaðni í lógini.

Amnesty Føroyar mælir til, at ásetingarnar í §§ 218-221 viðvíkjandi serliga sárbærum bólkum, verða dagførdar, soleiðis at umstøðurnar, sum gera seg galdandi í hesum ásetingum, verða herðandi heldur enn linnandi.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er ein misskiljing, at ásetingarnar í §§ 218-221 viðvíkja linnandi umstøðum. Persónar í sárbærum bólkum, sum ikki samtykkja til samlegu, eru fevnd av § 216, júst sum øll onnur, sum ikki samtykkja samlegu. §§ 218-220 fevna um tey føri, har órættaði samtykkir til samlegu, men har gerningsmaðurin má sigast at misnýta støðuna til at skaffa sær samlegu.

Amnesty Føroyar viðmerkir eisini, at § 221, sum viðvíkur, at ein persónur sníkir seg til samlegu, eigur at verða strikað og lagt afturat § 216. Amnesty Føroyar metir, at slík støða er neyðtøka, tí samtykki fyriliggur ikki.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ætlanin er at gera dagføringar í kapitli 24 um kynslig brotsverk umframt aðrar dagføringar. Mett varð tó, at dagføringin viðvíkjandi kynsligari avnoyðslu og lokking hevði skund, og tí bíðar dagføringin av § 221, til næstu ferð dagføringar verða gjørdar í revsilógini.

Kvinnuhúsið mælir til, at orðið "samlega" í § 225 verður broytt til "tvungin samlega" ella "valdstøka".

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at § 225 ásetir at §§ 216-224 eru galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Ásetingin lýsir sostatt nær ásetingarnar viðvíkjandi neyðtøku og misnýtslu av ymiskum slag kunnu brúkast, hóast talan ikki er um samlegu. Samlega er annars ein fyritreyt fyri at nýta hesar ásetingar. § 225 víðkar sostatt nýtsluøkið fyri §§ 216-224.
Løgmálaráðið skal gera vart við, at § 225 kann nýtast óansæð aldur og ikki einans, tá ið talan er um børn.

SSP-Ráðgevingin viðmerkir, at § 225 eigur at lýsa, hvussu gerningsmaðurin fær órættaða at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at § 225 vísir til §§ 216 – 224, og víðkar sostatt nýtsluøkið fyri hesum ásetingum til eisini at fevna um kynsligar gerðir, sum viðkomandi fremur á seg sjálvan. Hvussu gerningsmaðurin skal fremja hetta (brotsgerðarevni) framgongur av ásetingunum, sum víst verður til. § 225 skal sostatt altíð nýtast saman við øðrum ásetingum.

SSP-Ráðgevingin metir ikki, at aldur og royndir hava týdning fyri, um gerningsmaðurin lokkar í nýggja § 229. Somuleiðis metir SSP-Ráðgevingin ikki, at royndirnar hjá órættaða eiga at fáa týdning fyri børn undir 15 ár og ung undir 18 ár.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at nýggja ásetingin viðvíkjandi lokking serliga vendir sær móti børnum undir 15 ár. Orsøkin til hetta er, at áðrenn persónurin er 15 ár, er eitt fullkomið forboð í móti kynsligum sambandi. Tá ið persónurin er millum 15 og 18 ár, er tað vanligt at tey uppbyggja samband við onnur við ætlan um at hava eitt sínámillum javnbjóðis kynsligt samband, eisini við persónar yvir 18 ár. Tað hevur tí týdning, at tey føri sum vera rakt, tá ið talan er um ung millum 15 og 18 ár, eru føri har ein persónur misnýtir sína yvirvág í aldri og royndum at lokka ein persón millum 15 og 18 ár. Um ikki man skilur í millum her, kann vanligur atburður millum ung gerast revsiverdur. Tað skal tí minni til fyri at talan er um lokking, tá ið talan er um ein persón undir 15 ár. Meðan tá ið talan er um persónar millum 15 og 18 ár, skal talan greitt verða um misnýtslu.

SSP-ráðgevingin viðmerkir, at "sextortion" eisini kann verða úrslit av hakking frammanundan, og at ásetingin møguliga átti at fevnt breiðari.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað framgongur av viðmerkingunum til ásetingina um kynsliga avnoyðslu í § 225, at hóttanir um at deila nakinmyndir kann verða hátturin, sum gerningsmaðurin nýtir fyri at tvinga viðkomandi til at fremja kynsligar gerðir við seg sjálvan. Tað hevur ikki týdning, hvussu gerningsmaðurin hevur fingið myndirnar, men um hann nýtir myndirnar at tvinga órættaða. Sum nevnt omanfyri, so vísir § 225 til millum annað ásetingarnar um neyðtøku og aðra

misnýtslu. Gerningsmaðurin kann sostatt revsast fyri neyðtøku sambært § 225, um gerðin annars samsvarar við innihaldið í § 216.

SSP-Ráðgevingin mælir til, at hugsa eisini verður um viðgerð til gerningsmannin og um sáttarroynd millum partarnar. Víst verður eisini á, at hetta hevur týdning fyri at órættaði skal koma víðari.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað hevur týdning eisini at hugsa um viðgerð av gerningsmanninum. Sum Brotsfrøðifelag Føroya áður hevur víst á, so hjálpir revsing lítið uppá um gerningsmaðurin endurtekur brotsverkið. Um vit ynskja at steðga atburðinum, so er neyðugt við viðgerð. Dómstólarnir kunnu taka avgerð um viðgerð saman við dóminum, trupulleikin er tó, at vit einki tílíkt tilboð hava í Føroyum í løtuni. Hetta eigur tó at verða ment í samband við at nýtt fongsul verður bygt.
Sáttarroynd kundi møguliga hjálpt órættaða víðari, men vit hava ongar ásetingar um hetta í revsilógini. Hetta er eitt evni, ið eigur at kannast nærri, tá ið arbeiðið við at smíða eina nýggja revsilóg fer í gongd.

Brotsfrøðifelag Føroya metir, at § 229 er ov avmarkandi og mælir til at ásetingin verður umorðað, soleiðis at aldur og royndir verða tiknar út.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at orsøkin til at orðingarnar "aldur og royndir" hongur saman við, at ásetingin eisini fevnir um ung millum 15 og 18 ár. Tað er ikki ynskiligt, at vanligur atburður millum ung sum eru yvir kynsliga lógaldurin, verður gjørdur revsiverdur. Sí annars viðmerkingina til SSP-Ráðgevingina longur uppi. Orðingin hongur somuleiðis saman við orðingina í § 223, stk. 2 sum viðvíkur at forføra ein persón undir 18 ár til samlegu.

Brotsfrøðifelag Føroya viðmerkir í samband við broytingina av § 225, at tað eisini kann hugsast, at persónurin fer kynsliga við øðrum enn brotsmanninum ella við síni umboðan í tykisheimi. Spurt verður eisini um, um tað ikki hevði verið lættast at breiðka hugtakið "aðrar kynsligar gerðir enn samlegu" til at fevna um kynslív við seg sjálvan og onnur, heldur enn at leingja greinina við at nevna ávísu førini, sum kanska verða fleiri.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tey føri, tá ið gerningsmaðurin tvingar ein annan at fremja kynsligar gerðir við órættaða, longu kunnu revsast sum viðvirkan til neyðtøku. Tað, sum hevur týdning, er at víðka ásetingina soleiðis, at tey føri, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, verða fevnd av ásetingini. § 225 vísir, sum nevnt longur uppi, til §§ 216 – 224, gerningsmaðurin kann tískil revsast fyri neyðtøku ella misnýtslu sambært § 225, um gerðin annars samsvarar við innihaldið í §§ 216-224. Løgmálaráðið metir ikki, at tað er ein gongd leið bert at breiðka hugtakið "aðrar kynsligar gerðir enn samlegu".

Brotsfrøðifelagið hevur ymiskar viðmerkingar til málburðin, skotið verður millum annað upp at broyta "fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan" til "at fara kynsliga við sær sjálvum". Brotsfrøðifelagið skjýtur eisini upp, at "byggir upp eitt samband" verður broytt til "bindur band" ella "bindur trúnaðarband".

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at orsøkin til at orðingin "fremja kynsligar gerðir" er nýtt í samband við kynsliga avnoyðslu, er tann, at tað hevur týdning at tað framgongur týðiliga, at órættaði aktivt fremur gerðirnar.
Somuleiðis hevur tað týdning í samband við lokking, at tað framgongur at talan er um eina gongd, har gerningsmaðurin so líðandi uppbyggir sambandið. Tað er hendan líðandi gongdin, har

gerningsmaðurin spakuliga fær álitið frá barninum, og samstundis hevur ætlan um at fremja eitt kynsligt brotsverk, sum verður gjørd revsiverd.
Løgmálaráðið ger tí ongar broytingar í orðingunum.

Etiska Ráðið tekur undir við dagføringina av revsilógini, sum ger at lokking og kynslig avnoyðsla verður revsiverd. Etiska Ráðið setur spurnartekin við, hvørt tað er munur á, tá fólk latast at vera ein íspunnin persónur, og tá fólk latast at vera ein ávísur veruligur persónur. Víst verður á, at hetta kann hava álvarsligar avleiðingar fyri tann persónin, hvørs samleiki verður nýttur at lokka onnur og spurt verður, hvørt talan er um skerpandi umstøður.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er dómsvaldið, sum má taka støðu til, um tað er ein skerpandi umstøða. Tað er ikki beinleiðis revsivert at nýta samleikan hjá einum øðrum, men møguliga er hetta revsivert, tá ið eitt brotsverk verður framt. Spurningurin er, um stuldur av samleika eigur at gerast revsivert. Hetta eigur at umhugsast, tá ið revsilógin skal dagførast næstu ferð.

Etiska Ráðið fegnast um uppskotið, men metir at børn og ung eiga at kunnast um lógaruppskotið, bæði so tey vita hvørji rættindi og hvørja verju tey hava, men eisini tí har eru dømi um børn og ung, sum gera seg talgilt inn á onnur børn og ung.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er samt við Etiska Ráðið, at børn og ung eiga at kunnast um lógaruppskotið. Sig Frá! verkætlanin kunnar børn og ung um harðskap, skipar fyri upplýsandi tiltøkum og fær til vega undirvísingartilfar fyri yrkisbólkar, felagsskapir og myndugleikar. Sig Frá! ætlar at kunna um lógaruppskotið. Tí er tað eisini viðmerkt, at tað kann hava fíggjarligar avleiðingar, um Sig Frá! skal kunna um lógaruppskotið.

Etiska Ráðið ger vart við, at tey meta uppskotið bøtir um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí tey eru tey, ið oftast uppliva lokking. Yvirhøvur er títtleikin av talgildum ágangi móti fólki, ið bera brek, høgur.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at soleiðis sum uppskotið er orðað, metir Løgmálaráðið ikki, at uppskotið beinleiðis bøtir um støðuna hjá teimum, ið bera brek, tá ið tað kemur til lokking. Høvuðsatlitið við ásetingini er at verja børn undir 15 ár og ung undir 18 ár. Av viðmerkingunum framgongur tað eisini, at ásetingin um lokking einans skal nýtast, tá ið tað ikki kann revsast fyri roynd at bróta ítøkiligar ásetingar um kynslig brotsverk.

Etiska Ráðið metir eisini, at uppskotið eisini kann hava minni góðar avleiðingar við sær, tí tað verður staðfest, at ósketni ikki er ein orsøk til, at ein sleppur undan revsing. Tað verður gjørt vart við, at serliga fólk, ið hava kognitiv og summi sløg av sálarligum brekum, væl kunnu hava ringt við at meta um, hvussu gomul fólk eru, og nær tað er passandi at siga og gera ting við onnur, serliga á talgildum pallum, og at meta um hvørt eitthvørt er satt ella ikki.
Etiska Ráðið metir sostatt, at fólk við kognitivum og sálarligum brekum fara at verða rakt serliga hart í samband við at ásett verður, at ókunnleiki um tilstandin og aldurin hjá órættaða, kann hava við sær revsing, hóast gerningsmaðurin hevur handlað í ósketni.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er gott, at Etiska Ráðið ger vart við hendan trupulleika. Løgmálaráðið skal eisini gera vart við, at hóast tað kann revsast við eini lutvíst linari revsing um gerningsmaðurin hevur verið ósketin um tilstandin og aldurin hjá órættaða, so krevur tað framvegis tilætlan til at fremja eitt kynsligt brotsverk, um revsast skal fyri lokking.
Harumframt er tað eitt krav fyri at kunna revsa eftir revsilógini, at viðkomandi er saknæmur (tilregnelig).

Í revsilógini er eisini møguleiki hjá dómstólunum at taka atlit at linnandi umstøðum. Hesar reglur eru at finna í §§ 82 og 83.
Í síðsta enda er tað Føroya Rættur sum avger, hvussu ásetingin skal nýtast.

Fróðskaparsetur Føroya tekur undir við, at nýggjar revsiásetingar verða settar inn í revsilógina, um hesar eru neyðugar, fyri at taka atlit til atburð, sum serliga er vorðin møguligur í seinastuni knýtt at menning av elektroniskum samskifti. Fróðskaparsetrið dugir kortini ikki at meta um, hvørt sjálvstøðugar ásetingar um avnoyðslu og lokking gera nyttu samanborið við longu galdandi ásetingar.
Fróðskaparsetrið vil ikki avvísa, at ein sjálvstøðug føroysk áseting um lokking kann hava virði. Hetta krevur kortini eina sjálvstøðuga viðgerð, men ongin slík tykist liggja aftanfyri lógaruppskotið.
Grundleggjandi metir Fróðskaparsetrið, at tað er ein ov einføld tiltrúgv til, at sjálvstøðugar ásetingar um avnoyðslu og lokking eru neyðugar og fara at betra um rættarstøðuna. Viðmerkt verður, at tað tykist sum føroyska lógin má spegla ta til eina og hvørja tíð galdandi donsku lógina.

Somuleiðis vísir Fróðskaparsetrið á, at danskir myndugleikar og serkøn leingi hildu tað vera óneyðugt við ein sjálvstøðugari áseting um lokking, tí mett varð, at ásetingar longu vóru í revsilógini, sum heimilaðu nøktandi revsing fyri flestu støður, sum kundu íkoma, eisini umvegis internetið.

Fróðskaparsetrið ger vart við, at tað í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt, at hóast lokking og kynslig avnoyðsla í ávísum førum kann revsast sambært øðrum ásetingum í revsilógini, so kann prógvbyrðan verða torfør at lyfta. Víðari verður sagt, at uppskotið skal tryggja, at tað í størri mun skal bera til at døma fyri kynsliga avnoyðslu og fyri lokking. Hetta gevur ta fatan, at prógvbyrðan er ein praktisk avbjóðing hjá ákæruvaldinum , har lóggevarin síðan við hesi broyting kann koma til hjálpar, so prógvbyrðan ikki gerst ein forðing fyri í størri mun at kunna fella dómar.

Fróðskaparsetrið leggur dent á, at revsirættarpolitikkur má vera um annað og meira enn at fella fleiri og harðari dómar. Hartil er stranga prógvbyrðan í revsimálum ein hornasteinur í vesturlendskari rættarmentan, og henda eigur ikki lættliga at linkast fyri at fremja einstakar revsilógarbroytingar. Fróðskaparsetrið eftirlýsir eina gjøllari fakliga viðgerð av, um broytingarnar eru neyðugar, umframt ein føroyskan revsirættarpolitikk og eitt revsipolitisk kjak, uttan hetta metir Fróðskaparsetrið ikki tað er nøkur orsøk til at hava eina serføroyska revsilóg.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at talan er um prinsipiellar og týdningarmiklar viðmerkingar sum Fróðskaparsetrið kemur við. Revsilógarbroytingar eiga sum grundregla at verða úrslit at gjøllari fakligari viðgerð og revsipolitiskum kjaki. Kynslig brotsverk er tó eitt sera eymt evnið í Føroyum, og serliga eymt, tá talan er um børn. Samfelagið er lítið og hesi lógarbrot fylla nógv millum fólk. Lógaruppskotið kemur í kjalarvørrinum av einum størri máli um kynsligan ágang móti børnum og ungum á netinum. Við støði í hesum vil landsstýrið, at nýggj lóggáva um lokking og kynsliga avnoyðslu skal leggjast fyri Løgtingið skjótast til ber.

Uppskotið byggir á álit um talgildan ágang (Rapport fra arbejdsgruppen om digitale krænkelser København 2022) har ein stórur meiriluti metti, at neyðugt var við nýggjum ásetingum um lokking og kynsliga avnoyðslu. Meirilutin metti tó, at aldursmarkið fyri lokking átti at verða sett við 15 ár, fyri at sleppa uttanum, at man ikki gjørdi vanligan atburð millum ung revsiverdan.
Politiskt varð tó hildið, at tað eisini eru tungtvigandi atlit til at verja ung undir 18 ár móti lokking, og danska lógin hevur tí eitt aldursmark uppá 18 ár.

Politisk hevur man eisini í Føroyum valt at seta aldursmarkið á 18 ár.

Løgmálaráðið metir eins og Fróðskaparsetrið, at tað ikki er nokk við fleiri og harðari dómum, tá ið hugsað verður um at fyribyrgja, at tílík brotsverk henda. Føroyskir brotsfrøðingar hava áður víst á, at tað er umráðandi at revsing ikki stendur eina, men at man eisini í dómum og sum part av revsingini, hugsar um viðgerð. Hetta er týdningarmikið fyri at minka um vandan fyri endurtøku av slíkum revsibrotum. Fongsulsrevsing eina vil í sera lítlan mun fyribyrgja endurtøku av revsibrotum og í fleiri førum hava júst øvuta ávirkan á lógarbrótaran. Revsing eigur tí at verða endurhugsað í síni heild, tá farið verður undir arbeiðið at gera eina nýggja føroyska revsilóg, soleiðis at endamálið við revsingini og revsihættir stuðla undir ynskta endamálinum.